**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **10/00523**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til Skúlaspíran**<br>Fíggjarnevndin hevur samtykt eina "umfordeiling" av játtanini innan ansingarøkið í sambandi við umleggingarnar sum vóru gjørdar eftir summarfrítíðina. Skúlaspírin er partur av hesum, men neyðugt er við eykajáttan av tí at peningur verður fluttur frá grein 3 (Børn og Ung) til grein 4 (Undirvísing)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at játta 400.000,00 kr. til skúlaspíran. Peningurin verður tikin av konto 3.26.11.510 (Børn og ung) | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| 2. | **10/00522**<br>**2.viðgerð av eykajáttanum í samband við gjøgnumgongd av fíggjarætlanini fyri 2010**<br><br>Fíggjarnevndin mælir til hesar eykajáttanir:<br><br>1. 40.000,00 kr. til konto 6.11.31.510 (Umsiting og røkt av føstum ognum) frá konto 5.24.510 (Spælipláss og sparkivallir)<br>2. 40.000,00 kr. til konto 6.38.13.510 (Verkstaðið í Leirvík) frá konto 5.24.510 (Spælipláss og sparkivallir)<br>3. 60.000,00 kr. til konto 6.38.13.510 (Kommunufjósið) frá konto 5.24.510 (Spælipláss og sparkivallir)<br>4. 50.000,00 kr. til konto 6.38.13.510 (Bilar) frá konto 6.30.41.510 (Kloakkir)<br>5. 100.000,00 kr. til konto 6.38.13.510 | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

(Maskinur) frá konto 6.30.41.510 (Kloakkir)

6. 100.000,00 kr. til konto 1.11.14.510 (Kommunufyrisiting). Peningurin verður tikin av innistandandi.
7. 100.000,00 kr. til konto 4.23.22.510 (Leirvíkar skúli). Peningurin verður tikin av innistandandi
8. 100.000,00 kr. til konto 2.20.23.510 (Tannrøkt). Peningurin verður tikin av innistandandi.
9. 130.000,00 kr. til konto 2.21.72.510 (Forsorg). Peningurin verður tikin av innistandandi.
10. 900.000,00 kr til konto 7.38.21.510 (Bussleið). Peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511 (íløgu í skúlan).
11. 300.000,00 kr. til konto 7.30.42.510 (Renovasjón). Peningurin verður tikin av innistandandi
12. 200.000,00 kr. til konto 20.50.11.510 (Rentuútreiðslur). Peningurin verður tikin av innistandandi.

**3. 09/00036**

**Góðkenning av sáttmála millum Nærverkið og Eysturkommunu**

Verandi sáttmáli millum Nærverkið og Eysturkommunu um hølini, sum stuðulstænastan

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

heldur til í í Gøtubrá er útgingin. Nærverkið hevur boðað frá at tey vilja halda fram við verandi sáttmála.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi sáttmála.

**4.** **10/00542**

**Fastir fundardagar hjá Eysturkommunu býráð 2011**

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskotið.

**5.** **10/00543**

**Umsókn um farloyvi frá Eysturkommunu býráð**

Elin V. Olsen søkir um farloyvi frá býráðsarbeiðinum í tíðarskeiðnum 01. januar 2011 til 01. juli 2011.

Einmælt samtykt at ganga umsóknini hjá Elin V. Olsen á møti, og at næsti maður á lista E, Páll Isholm tekur hennara sæti í býráðnum og nevndum.

**6.** **10/00505**

**Álit um skattafrælsi til G!**

Fíggarnevndin mælir til at geva álit.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**7.** **10/00498**

**Umlegging av 6 røktarheimsplássum í Gøtubrá til sambýlispláss**

Kommunan hevur fingið svar frá Almannaráðnum, um at tey ikki vilja umleggja Gøtubrá til Ellis- og røktarheim, og ætlandi umlegging av røktarheimsplássunum verður framd.

Nærverkið biður Eysturkommunu greiða frá um kommunan leggur plássini í kjallaranum í Gøtubrá niður.

Um Almannaráðið niðurleggur røktarheimsplássini, og tey vera sambýlispláss í framtíðini, verður neyðugt við eini eykajáttan til Gøtubrá.

Eysturkommunu býráð staðfestir at talan er ikki um sparing, men um eina flyting av útreiðslum frá landið til Eysturkommunu.

Eysturkommunu býráð ger vart við at tilboðið til Almannaráðið frá Eysturkommunu um at broyta sambýlið Gøtubrá til ellis- og røktarheim stendur við.

Eysturkommuna er sinnað framhaldandi at verða við til at menna eldraøkið í Eysturoynni.

**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Fíggjarnevndin staðfestir at talan er ikki um sparing, men um eina flyting av útreiðslum frá landið til Eysturkommunu.

Fíggjarnevndin ger vart við at tilboðið til Almannaráðið frá Eysturkommunu um at broyta sambýlið Gøtubrá til ellis- og røktarheim stendur við.

Eysturkommuna er sinnað framhaldandi at verða við til at menna eldraøkið í Eysturoynni.

**8. 10/00541**

**Blokkurin hjá brunaleiðarinum fíggjarárið 2011**

Støðutakan til um brunaleiðarin skal hava blokk til rakstur.

Brunanevndin mælir til at brunaleiðarin fær ein blokk til raksturin og hevur ábyrgdina av hesum.

Málið tikið av skrá.

**9. 10/00477**

**Kloakkleiðing í Norðragøtu**

Í samband við dagføringar og at leggja nýggjar kloakkir samsvarandi heildarætlanum fyri Eysturkommunu, er innheinta tilboð upp á ein part av hesum arbeiði í Norðragøtu.

Málið tikið av skrá.

**10. 10/00539**

**Nýggj gravimaskina til kommununa**

Í samband við at játtan er til nýggja maskinu til komandi ár, verður uppskot til maskinu og kostnaðurin lagdur fram til støðutakan.

**Tilboð er frá :**

- OK-heilsøla kr. 510.000,00 uttan mvg.

Tekniska nevnd mælir til at taka av tilboðnum frá OK

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Peningurin verður tikin av konto 6.38.13.511 (Rakstrargøgn) av játtanini fyri 2011.

**11. 10/00545**

**Tilboð um keyp av egningaskúrunum í Leirvík**

P/F Hvilvtenni (Kjartan Joensen) hevur boðið kommununi at keypa egningarskúranar í Leirvík.

Fíggjarnevndin mælir til at beina málið í teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**12. 10/00151**

**Grót í Norðragøtudali**

Kommunan hevur móttikið tvørskúrðar og uppmátingar av lendinum frá samtakinum ið skal gerða Landsvegin ígjøgnum Leirvík.

Sambært uppmátingunum er tað møguligt at lækka verandi planering/lendi við 3,0 m, tí at ein endalig planering, fundamentir og gólv á komandi bygningum kemur at liggja umleið 0,5 m til 0,8 m hægrið enn tann nýggja planeringin ið verður gjørd av samtakinum RTS/JHR.

Tekniska nevnd mælir til at lækkað økið við 3,0 metur, treyta av at skráar o.a. verður gjørt í neyvum samstarvi við Eysturkommunu.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**13. 09/00530**

**Bátahylur á Toftanesi**

Støðutakan at gerða pierarnar til bátahylin á Toftanesi.

Bygginevndin fyri bátahylin mælir til at gerða pierarnar (grótkastið) sambært uppskotinum hjá Landsbyggifelagnum og Selmar Nielsen.

Mettur kostnaður er 1.000.000,00 kr. uttan mvg.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | | |
|---|---|---|
| **14.** | **10/00000**<br>**1.viðgerð av eykajáttan til bátahylin í Leirvík á Toftanesi**<br>Fíggjarnevndin mælir til at játtað 1.000.000,00 kr.<br><br>Peningurin verður tikin av innistandandi | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| **15.** | **10/00399**<br>**Umsókn, frá Víkingi, um fíggjarligan stuðul 2011**<br>Trivnaðarnevndin mælir til, at Víkingur fær útgoldið kr. 500.000 í 2011. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510. (Stuðul til írróttar- og mentanarendamál)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| **16.** | **10/00438**<br>**Umsókn frá samanlagda svimjifelagnum í Eysturkommunu um fíggjarligan stuðul**<br>Heitt verður á ein stuðul áljóðandi kr. 60.000,00<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til, at Reysti fær útgoldið kr. 60.000 í 2011. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510. (Stuðul til írróttar- og mentanarendamál)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

## Býráðsfundur mánadagin 13. desember 2010 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

## Fundurin lokin kl. 21.00

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Elin V. Olsen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________